# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 23. juli 2018
Mál nr.: 18/00633
Málsviðgjørt: DB og HEIP

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014** (markamót)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**
(markamót)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 9, stk. 3 verður ", røkt ella stuðli" broytt til: "ella røkt".

**2.** § 10 verður orðað soleiðis:

"**§ 10.** Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum og persónum, ið hava varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hann kann búgva í egnum heimi sum longst.

*Stk. 2.* Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, dagtilboð, ergoterapi, fysioterapi, fyribyrgjandi venjing, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr."

**3.** Aftan á § 10 verður sett:

"**§ 10 a.** Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna mistan førleika tørva endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin:
1) kann búgva heima sum longst, og
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi."

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um endurvenjing, undir hesum treytir fyri at fáa endurvenjing og reglur

um endurvenjingarætlan og samstarv við almannaverk og sjúkrahúsverk.

**4.** Aftan á § 10 verður sett:

“**§ 10 b.** Kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna ellisbrek ella sjúku hava týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.
*Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at fólkapensjónisturin:
1) kann búgva heima sum longst, og
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.
*Stk. 3.* Kommunurnar gera av, hvussu viðlíkahaldsvenjing verður veitt, undir hesum tal av tímum
til viðlíkahaldsvenjing. Innan játtanarskeiðið endar, skulu kommunurnar hava tikið nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing.”

**5.** § 12, stk.1 verður orðað soleiðis:
“Kommunurnar kunnu taka avgerð um at veita fólki samsýning, ið átaka sær at ansa heima:
1) fólkapensjónisti við ellisbreki ella varandi sjúku, sum hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið, ella
2) persóni við varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, og sum hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.

**6.** § 14 verður orðað soleiðis:

“**§ 14.** Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa
1) fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið
2) persónum við varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.
*Stk. 2.* Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli móti gjaldi frá landinum hýsa persóni, ið hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið vegna týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar.
*Stk. 3.* Kommunurnar skulu boða Almannaverkinum frá, tá persónur fær bústað, sambært stk. 1, nr. 1 og 2.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið er liður í yvirskipaðu ætlanini hjá samgonguni at virka fyri, at vælferðarskipanin í størri mun verður lagað til føroysk viðurskifti og at fremja nýskipanir á almannaøkinum, sum skulu tryggja øllum borgarum góða tænastu, rættartrygd og møguleikar at liva og virka í Føroyum.

Endamálið við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er at avgreiða nøkur av markamótunum, sum verið hava millum land og kommunur eftir, at ávísar tænastur vórðu fluttar frá landinum til kommunurnar í 2015.

Uppskotið verður lagt fram saman við uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin), ið setir kós fyri, hvussu partar av føroysku vælferðarskipanini skulu skipast soleiðis, at borgarar, sum ikki megna at uppihalda sær sjálvum og sínum, og borgarar, sum bera brek og hava varandi sjúku, fáa neyðugar veitingar og tænastur til tess at virka á jøvnum føti við aðrar føroyingar.

Landsstýrismaðurin vil við uppskotinum í størri mun tryggja, at borgarar frameftir ikki detta niðurímillum vegna ógreið viðurskiftum millum land og kommunur.

Uppskotið tekur støði í avgerðum, sum markamótsnevndin hevur tikið, síðani hon fór at virka, og er somuleiðis tillagað í mun til ásetingar um tænastur, sum landið hevur ábyrgd av sambært uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.

Landsstýrismaðurin leggur samstundis fram uppskot til løgtingslóg um tvingsil, sum hevur til endamáls at styrkja um rættartrygdina hjá borgarum, sum fáa tænastur sambært lóg um almannatrygd og vælferð, lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., og barnaverndalógini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. kom í gildi í 2015, tá partar av tænastum, sum áður vórðu skipaðar sambært forsorgarlógini, vórðu fluttar frá landinum til kommunurnar at umsita.

Í sambandi við umskipanina varð avgerð tikin um, at heimatænastan og eldrarøkt í sínum táverandi líki skuldi flytast frá landinum til kommunurnar, og at tað framhaldandi skuldi vera tørvurin hjá borgaranum, sum skuldi vera avgerandi fyri, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av tænastuni.

Síðani 2015 hava kommunurnar havt ábyrgd av at veita øllum borgarum heimatænastu og at veita fólkapensjónistum búpláss á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli.

Í viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. varð víst á, at tað framhaldandi vóru nøkur markamót millum land og kommunur, sum ikki vóru avgreidd, og sum støða mátti takast til aftaná, at lógin varð samtykt.

Í 2016 skrivaðu landsstýrismenninir við almannamálum og heilsu- og innlendismálum og formaðurin í kommunufelagnum undir sokallaða "Markamótsskjalið", sum í høvuðsdrøgum staðfesti, hvørji markamót eru millum land og kommunur, og hvussu hesi markamót skulu handfarast og loysast, sum frá líður.

Síðani eru tað serliga fylgjandi markamót, sum hava verið til viðgerðar millum land og kommunur:

- Búpláss á ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum hjá kommunum og vardan bústað frá landinum.
- Dagtilhald og umlætting.
- Heimatænasta hjá kommununum og stuðulstænasta hjá Almannaverkinum.
- Endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunum og vantandi viðlíkahaldsvenjing.

*Búpláss*

Løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt ásetir meginregluna um, at kommunur veita fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið, búpláss á ellis- og røktarheimi og eldrasambýli.

Heimild er tó í lógini fyri, at kommunurnar í serligum føri kunnu veita røktarkrevjandi borgarum, sum ikki eru fólkapensjónistar, búpláss á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli.

Ivamál hava verið um, hvørjir borgarar undir fólkapensjónsaldri eiga at fáa búpláss frá kommununi, og hevur markamótsnevndin tikið fleiri avgerðir um, nær landið og nær kommunurnar skulu veita búpláss til borgarar undir 67 ár, sum eru røktarkrevjandi.

Markamótsnevndin metir, at kjarnuøkið fyri røktarkrevjandi undir 67 ár, ið kunnu fáa búpláss eftir § 14, stk. 2, eru borgarar, ið hava sjúku, ið eldri fólk vanliga fáa, og sum er progressiv og degenererandi. Alzheimers og onnur sløg av demensi eru mest vanligu sjúkur í so máta, ið elva til, at persónur gerst óafturvendiliga og alsamt meira røktarkrevjandi. Sclerosa á seinni stigi er annað dømi.

Markamótsnevndin metir øvugt, at borgarar, sum hava seinheilskaða, sum útgangsstøði eiga at vera ábyrgd hjá Almannaverkinum eftir forsorgarlógini. Hesir borgarir eru vanliga í eini stabilari/varandi støðu, og hava teir tørv á aðrari hjálp og stuðli.

Markamótsnevndin hevur somuleiðis víst á, at borgarar, sum hava demens orsakað av alkoholnýtslu, eiga at fáa bútilboð frá Almannaverkinum.

*Dagtilhald og umlætting*

Ógreiða hevur somuleiðis verið um, hvør skal veita dagtilboð og umlætting til persónar undir 67 ár, sum hava demens. Sambært § 10 í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. kunnu kommunur

veita heimabúgvandi fólkapensjónistum dagtilhald og umlætting. Kommunurnar hava dagtilhald og umlættingartilboð kring landið til borgarar, sum hava demens.

Áðrenn umskipanina var eitt dagtilhald til persónar undir 67 ár, sum hava demens. Dagtilhaldið var staðsett í Tórshavn, og varð virksemið flutt í sambandi við umskipanina.

Síðani hevur landið ikki havt dagtilhald til henda málbólk, og hava Almannaverkið og kommunur verið ósamdar um, hvør skal veita tænastuna. Markamótsnevndin hevur tikið avgerð um, at talan er um eina stuðulstænastu, sum skal veitast sambært forsorgarlógini, og síðani hevur landsstýrismaðurin tikið stig til at seta á stovn eitt landsfevnandi dagtilhald, sum er staðsett í Tórshavn og verður umsitið av Almannaverkinum.

Tað er ein avbjóðing hjá Almannaverkinum at skipa dagtilhald til borgarar, sum hava demens kring landið. Partvíst tí at flestu starvsfólkini, sum høvdu serkunnleika til demens, vórðu starvssett í kommunum, tá umskipanin varð framd í 2015, og partvíst tí at tað eru lutfalsliga fáir borgarar í ávísum økjum, sum ikki eru vorðnir fólkapensjónistar, sum hava demens. Kommunurnar hinvegin hava dagtilhald til fólkapensjónistar, sum hava demens kring landið.

Almannaverkið hevur ikki umlættingartilboð til borgarar, sum hava demens, meðan kommunur kring landið veita umlætting á ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum. Kommurnar hava serligar deildir fyri persónar við demens og hava nógv starvsfólk við serkunnleika til demens.

*Heimatænasta og stuðulstænasta*
Kommunurnar hava ábyrgdina av heimatænastuni, sum er skipað sambært § 9 í lógini um heimatænastu og eldrarøkt. Heimatænastan er ikki aldurstreytað og fevnir um heimahjálp og sjúkrarøkt.

Landið varðveitti ábyrgdina av stuðulstænastuni, sum er skipað sambært § 32 b í forsorgarlógini, og er stovnsett til at stuðla borgarum millum 18 - 66 ár, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so teir hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív. Stuðulin kann halda áfram eftir, at borgarin er vorðin 67 ár, um viðkomandi framvegis fær gagn av stuðlinum og hevur møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

Ivamál hava verið um, hvussu røkt og stuðul skulu skilmarkast og harvið eisini, hvørja uppgávu ávikavist heimatænastan og stuðulstænastan hava. Tað kann vera torført at skilja ímillum, og serliga er hetta galdandi, tá ein persónur fær umfatandi stuðulstænastu og heimatænastu. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri kommunur og landið hevur arbeitt við at gera neyðugar vegleiðingar til hetta markamótið. Bólkurin var tó samdur um fylgjandi skilmarking og nágreining av hugtøkunum røkt og stuðul:

> *Røkt:*
> Tænasta, sum hevur til endamáls at hjálpa einum persóni við grundleggjandi uppgávum, sum hava við persónliga røkt og onnur viðurskiftir, sum viðvíkja dagligari lívsførslu. Tænastan kann umfata hjálp til persónligt reinføri og at tryggja, at borgarin fær mat og drekka.
> Persónlig hjálp og røkt kann bæði veitast við einum mennandi, aktiverandi, viðlíkahaldandi og linnandi endamáli. Atlit verða tikin at sjálvsavgerðarrætti borgarans.

*Stuðul:*

Tænasta, sum gjøgnum ráðgeving og vegleiðing, hevur til endamáls at viðlíkahalda og menna førleikar hjá borgaranum, soleiðis at hann hevur møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív. Tænastan verður veitt til borgarar við serligum tørvi, og verða tilboðini tillagað tí einstaka við atliti at sjálvsavgerðarrætti borgarans.

Bólkurin fór í tvíningar, og Almannamálaráðið fekk 2 ymisk tilmæli – eitt frá kommunalu umboðunum og eitt frá umboðunum frá Almannaverkinum. Bólkurin var ikki samdur um, hvør skal veita tænastuna, tá tað snýr seg um borgarar, sum fáa nógvan stuðul frá Almannaverkinum og eisini hava tørv á røkt.

Umboðini fyri kommunurnar meta ikki, at tað er ráðiligt at skilja millum røkt og stuðul, men meta tó heldur ikki, at tað er skynsamt at býta heimatænastuna sundur við aldurmarkið 67 ár.

Tí mæltu tey til, at fólk, sum eru 66 ár og yngri, sum fáa nógvan stuðul frá Almannaverkinum, og sum samtundis hava tørv á røkt, verða ábyrgd hjá Almannaverkinum soleiðis, at vald og gjald fylgjast at.

Tá talan er um borgarar, sum hava tørv á røkt, stuðli og sjúkrarøkt, mettu umboðini fyri kommunurnar, at kommunurnar eiga at fáa ábyrgd av hesum. Hetta eru fólk við KOL, krabbameini, parkinson, apopleksi v.m.

Umboðini fyri Almannaverkið vísa á, at borgarin fær bestu tænastu við, at Almannaverkið framhaldandi hevur ábyrgd av at veita stuðulstænastu, og at kommunurnar framhaldandi veita røktina. Umboðini vísa á, at stuðul og røkt krevja ymiskan fakligan førleika. Námsfrøðiligar stuðulsuppgávur krevja serliga fakligan førleika, og eru starvsfólk lærd upp til hesa uppgávuna. Hesi starvsfólk eru í dag sett hjá Almannaverkinum. Sama er galdandi fyri røktaruppgávuna, sum varð flutt til kommunurnar í 2015. Røktarstarvsfólkini eru sett hjá kommununum og fáast við heimatænastu.

Í tilgongdini at staðfesta og royndini at loysa markamótini hava umboð fyri Kommunufelag Føroya og Almannamálaráðið verið á einum máli um, at tað ikki altíð eru verulig markamót, sum skilja kommunur og Almannaverkið, men at skipanir eru undir stórum trýsti, tí tørvurin á búplássum hjá báðum pørtum er størri enn útboðið á bútilboðum. Mál hava verið, har kommunurnar meta, at ein borgari fær ov lítlan stuðul frá Almannaverkinum, og tískil kennir kommunan seg noyddan at veita meira heimahjálp. Kommunufelagið hevur m.a. víst á, at tað nærum hevur verið ómøguligt hjá borgarum, sum eru yngri enn 67 ár, og sum hava demens, at fáa stuðul. Eisini eru mál um borgarar í andingartólum, sum hava tørv á stuðli og røkt, sum partarnir ikki verða samdir um.

*Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing*

Seinnu árini hevur verið arbeitt við at skipa endurvenjing í Føroyum. Endurvenjing er ein lógarfest tænasta í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., forsorgarlógini og sjúkrahúslógini, og verður endurvenjing veitt í ávikavíst sjúkrahúsverkinum, almannaverkinum og kommununum.

Sjúkrahúsverkið veitir ókeypis endurvenjing til sjúklingar, sum hava ein læknafakliga grundaðan tørv á endurvenjing bæði við skaða og sjúku. Endamálið er, at sjúklingurin endurvinnur sínar mistu førleikar. Ábyrgdarøkið fevnir ikki um viðlíkahaldsvenjing.

Almannaverkið veitir endurvenjing til frama fyri, at borgarin fastheldur ella kann fáa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin ella klárar seg við minni ella ongari hjálp frá almannaverkinum. Ábyrgdarøkið fevnir ikki um viðlíkahaldsvenjing og fevnir bara um borgarar, ið eru millum 18 og 66 ár.

Kommunurnar veita sokallaða gerandisendurvenjing, sum hevur til endamáls at viðvirka til, at fólkapensjónistar kunnu búgva heima sum longst.

Í tilmælinum um eina samskipaða endurvenjing frá 2016 verður víst á, at tað eru viðurskifti, sum orsakað av lóggávuni eru ógreið. Í høvuðsdrøgum snýr tað seg um, hvar markið er millum sjúkrahúsendurvenjing og ta endurvenjing, sum ávíkavíst almannaverkið og kommunurnar skulu veita, og málbólk, sum ikki fellur innan fyri forsorgarlógina ella lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
Samanumtikið verður víst, at sjúkrahúsverkið, almannaverkið og kommunali geirin hava partvíst somu og partvíst ymisk ábyrgdarøki í sambandi við endurvenjing.

Í 2017 vórðu tvinnar kunngerðir settar í gildi, sum hava til endamáls at nágreina endurvenjing í ávikavist sjúkrahúsverkinum og almannaverkinum og at tryggja, at borgarar kunnu fáa eina málrættaða og samskipaða endurvenjingartænastu. Kunngerðirnar hava eisini áseting um endurvenjingarætlan og áleggja ávikavist sjúkrahúsverkinum og Almannaverkinum at samskipa endurvenjing millum sjúkrahúsverkið, almannaverkið og kommunurnar.

Heilsu- og innlendismálaráðið, Almannamálaráðið og Kommunufelagið eru farin undir at kanna, um ásetingarnar í kunngerðum frá 2017 viðvíkjandi endurvenjingarætlan, markamótum og samstarvinum millum myndugleikar virka eftir ætlan.

Heimild er ikki í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., at áseta nærri reglur um endurvenjing í kommununum.

Tað er ásett í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. at kommunurnar kunnu veita viðlíkahaldsvenjing til fólkapensjónistar.

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing verður somuleiðis víst á tørvin at fáa skipaða viðlíkahaldsvenjing til borgarar í øllum aldri í Føroyum, tí tað gevur lítla meining at veita endurvenjing við tí fyri eyga at endurvinna førleikar, um tað samstundis ikki verður tryggjað, at borgarin fær viðlíkahildið sínar førleikar.

Ongin skipað viðlíkahaldsvenjing er í Føroyum til borgarar undir 67 ár.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Høvuðsendamálið við uppskotinum er í størri mun at tryggja, at borgarar frameftir ikki detta niðurímillum skipanir hjá landinum og kommununum.

Endamálið við uppskotinum er at greiða markamót millum land og kommunur í mun til fylgjandi:

- Búpláss á ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum hjá kommunum og vardan bústað frá landinum.
- Dagtilhald og umlætting
- Heimatænasta hjá kommununum og stuðulstænasta hjá Almannaverkinum
- Endurvenjing í sjúkrahúsverki, almannaverki og kommunum og vantandi viðlíkahaldsvenjing.

Í høvuðsheitum er endamálið at staðfesta, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita persónum undir fólkapensjónsaldri, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi, búpláss á ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum umframt dagtilhald og umlætting.

Endamálið er somuleiðis at staðfesta, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita øllum borgarum, eisini teimum, sum fáa umfatandi stuðulstænastu frá landinum, røkt.

Endamálið er eisini at nágreina ásetingar um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing soleiðis, at tað er greitt, hvør hevur rætt til hesar tænastur frá kommunu, og hvat endamálið við tænastunum frá kommunum er, og at fáa neyðuga heimild til at áseta nærri reglur um endrvenjing og samskipan við ávikavist sjúkrahúsverkið og Almannaverkið.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

*Búpláss*

Uppskotið ásetir, at kommunurnar, umframt at veita fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, sum hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið, eisini veita borgarum, sum eru undir fólkapensjónsaldri, og sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenerativ, búpláss á ellis- og røktarheimum ella eldrasambýlum.

Málbólkurin er m.a. fólk við Alzheimers, demens og sclerosu á øðrum stigi, sum eru sjúkur sum í so máta elva til, at persónur gerst óafturvendiliga og alsamt meira røktarkrevjandi.

Borgarar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar og eru undir fólkapensjónsaldri fáa búpláss sambært § 45 ella § 46 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.

Í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð verður ásett, at landið veitir borgarum undir fólkapensjónsaldri, sum hava seinheilaskaða og borgarum, sum bera fjølbrek, búpláss, hóast nógvir av hesum mugu metast at vera røktarkrevjandi.

Uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð heimilar somuleiðis, at borgarar, sum hava búð í vardum bústaði hjá Almannaverkinum, áðrenn teir vórðu fólkapensjónistar, kunnu verða búgvandi í varda bústaðnum, um borgarin sjálvur ynskir tað, og um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið.

Orsøkin er meginreglan um sjálvsavgerðarrætt, og at fólk, sum bera brek, so vítt gjørligt skulu hava møguleika fyri at velja, hvar tey vilja búgva, og at forða fyri, at borgarar detta niðurímillum tvær skipanir, orsakað av aldri.

Hinvegin so gerast borgarar, sum orsakað av týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum fáa vardan bústað frá Almannaverkinum, alsamt eldri, og harvið eisini alsamt meira røktarkrevjandi. Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum eru tað í løtuni 19 persónar, sum eru 67 ár og eldri, sum fáa búpláss frá Almannaverkinum.

Tá vardi bústaðurin ikki longur kann veita borgaranum eina nøktandi tænastu, so kann borgarin fáa pláss á einum ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli eins og aðrir borgarar, sum eru fólkapensjónistar og hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið. Í slíkum føri verður tað kommunan, sum yvirtekur ábyrgdina av borgaranum. Í slíkum førum verður tað talan um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum máli.

Tað eru eisini nógvir persónar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum búgva leingi í egnari íbúð við tænastum frá Almannaverkinum og heimatænastu frá kommununi. Hesi gerast eisini alsamt eldri.

Frameftir skulu persónar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum eru fólkapensjónistar, og hava verið heimabúgvandi alt lívið, fáa pláss á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli í nærmumhvørvinum eins og onnur, tá tey gerast røktarkrevjandi, orsakað av ellisbreki ella varandi sjúku.

Borgari, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hevur víðfevndar sosialar trupulleikar og er fólkapensjónistur, kann ikki fáa tillutað vardan bústað sambært løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, um viðkomandi, orsakað av ellisbreki ella varandi sjúku hevur tørv á røkt og hjálp alt samdøgrið.

Kommunur kunnu tískil ikki nokta einum fólkapensjonisti, sum ber brek, búpláss á einum røktarheimi, um viðkomandi annars livir upp til treytirnar fyri at fáa eitt røktarheimspláss.

Hetta er í samsvari við meginreglurnar um inklusión og sektorábyrgd, sum í høvuðsheitum merkja, at borgarar, sum bera brek, ikki skulu noyðast í sertilboð, og at hvør myndugleiki, sum hevur ábyrgd av at veita eina almenna tænastu, eisini hevur ábyrgd av at tryggja, at sama tænasta verður veitt borgarum, sum bera brek.

*Búpláss mótvegis gjaldi*
Heimild er fyri, at ellis- og røktarheim og eldrasambýli mótvegis gjaldi frá landinum kann hýsa persóni, sum hevur tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið, orsakað av týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum. Talan er um persónar, sum fáa vardan bústað frá landinum sambært § 45 ella § 46 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.

Almannaverkið hevur stórar avbjóðingar við at veita bústað til eitt nú fólk við seinheilaskaða, og hóast ætlanir eru um at byggja fleiri bústaðir til henda málbólk, so verður neyvan talan um at byggja bústaðir kring landið. Borgarar, sum hava seinheilskaða og hava tørv á einum vardum bústaði frá Almannaverkinum, eru úr øllum landinum. Tað er ein avbjóðing hjá Almannaverkinum at veita teimum bústað í nærumhvørvinum, og verða tey tískil noydd at flyta.

Møguleiki er nú sambært hesum uppskoti fyri, at Almannaverkið kann keypa búpláss á einum røktarheimi ella einum eldrasambýli og harvið geva borgaranum møguleika fyri at búgva so tætt familju og tí umhvørvi, sum hann var partur av, áðrenn hann fekk heilaskaða.

Skal ásetingin virka í praksis, er alneyðugt, at land og kommunur semjast um ein kostnað fyri búpláss, hvør frá øðrum.

Heimild er eisini í § 68 í  uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð fyri, at Almannaverkið mótvegis gjaldi kann veita ávísar tænastur til kommunur herundir eisini bústað.

*Dagtilhald og umlætting*
Kommunur fara frameftir eisini at veita persónum undir fólkapensjónsaldri, sum hava Alszheimer, aðrar demenssjúkur og sclerosu á øðrum stigi, dagtilhald, umlætting og aðrar tænastur, sum kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hesir kunnu búgva í egnum heimi sum longst.

Endamálið við hesi broyting er at forða fyri, at land og kommunur veita somu borgarum somu tænastu, og at fyribyrgja, at land og kommunur skulu seta í verk paralellar tænastur og at skapa fortreytir fyri, at hesir borgarar fáa eina dygdargóða fakliga tænastu frá starvsfólki, ið hevur serkunnleika til hesar varandi sjúkur, sum eldri persónar samlíkt fáa.  Dømi um hetta er m.a. dagtilhald til persónar við demensi, har Almannaverkið hevur eitt tilboð til fólk undir fólkapensjónsaldri, kommunurnar kring landið hava tilboð til fólkapensjónistar. Frameftir verða tað kommunurnar, sum veita dagtilhald til persónar, sum hava Alzheimers, aðrar demens sjúkur og sclerosu á øðrum stigi.

*Heimatænasta*
Uppskotið ásetir, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita øllum heimabúgvandi borgarum heimatænastu, sum fevnir um heimahjálp og heimasjúkrarøkt.

Í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð verður ásett, at virksemið hjá stuðulstænastuni ikki fevnir um persónliga røkt umframt tað, sum persónurin sjálvur megnar við ráðgeving frá stuðulspersóninum.

Tískil verður uppgávan hjá kommununi at veita heimabúgvandi borgarum persónliga røkt.

Tað er kommunan, sum tillutar heimatænastu, og tað er Almannaverkið, sum tillutar stuðulstímar, og kunnu partarnir framvegis gera sínámillum avtalur um, at t.d. stuðulstænasta veitir røktina í málum, har persónur fær umfatandi stuðul. Í slíkum førum gera partarnir

sínámillum avtalur, sum m.a. eisini fevna um kostnað, hvussu nógvar tímar tænastan fevnir um,  og nær tænastan verður veitt.

Tað er framhaldandi neyðugt, at Almannaverkið og kommunur samskipa tænasturnar sínamillum soleiðis, at borgarin fær eina dygdargóða og samskipaða tænastu, sum er tillagað til hansara tørv og ynski.

Somuleiðis er ásett, at stuðulstænasta er ætlað persónum upp til fólkapensjónsaldur, sum hava týðandi likamligt ella sálarlig brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar. Tænastan kann halda áfram, tá persónurin er vorðin fólkapensjónistur, um tað framhaldandi tænir endamálinum við tænastuni.

Persónar, sum búgva á vardum bústaði hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovni, fáa neyðuga hjálp til persónliga og sjúkrarøkt frá starvsfólkum, sum sett eru í Almannaverkinum ella í sjálvsognarstovninum.

*Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing*

Uppskotið ásetir, at kommunurnar veita endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing til fólkapensjónistar, og at endamálið við tænastunum er at virka fyri, at fólkapensjónistar kunnu búgva í egnum heimi sum longst og klára seg uttan ella við minni hjálp frá kommunum. Í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð verður ásett, at borgarar, sum eru millum 18 ár og fólkapensjónsaldur, kunnu fáa endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing frá Almannaverkinum, og er endamálið at virka fyri, at hesir kunnu fáa og varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og klára seg uttan ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta nærri reglur um endurvenjing. Í tilmælinum um eina samskipaða endurvenjing frá 2016 var m.a. víst á týdningin av, at heimildin verður fingin soleiðis, at møguleiki er fyri at samskipa endurvenjing í sjúkrahúsverkinum, almannaverkinum og kommununum.

Endamálið við heimildini hjá landsstýrismanninum er at áseta líknandi reglur, sum eru í kunngerðum um endurvenjing í almannaverkinum og sjúkrahúsverkinum. Kunngerðirnar viðvirka til, at borgarar fáa eina samskipaða endurvenjing, og at myndugleikar skulu samskipa endurvenjingina yvir um geirar.

*Ansingarsamsýning*

Kommunur fáa nú heimild til at taka avgerð um at veita fólki samsýning, sum átaka sær at ansa persóni heima, sum hevur varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi.

Talan er um fylgibroyting í sambandi við, at kommunurnar veita búpláss til borgarar, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi.

Endamálið við skipanini við ansingarsamsýning er m.a. at gera tað møguligt hjá borgarum at vera sum longst í egnum heimi, og kann skipanin eisini lætta um trýstið á ellis- og røktarheim og eldrasambýli.

Broytingin verður gjørd fyri at tryggja, at samanhangur er millum skipanina við ansingarsamsýning og búpláss á ávikavist ellis- og røktarheimi og eldrasambýli

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýrið. Harumframt er uppskotið sent hesum til hoyringar:

Kommunufelag Føroya
Stjórnarráðum við áheitan um at senda til viðkomandi undirliggjandi stovnar
MEGD við áheitan um at senda til limafeløgini
Heilsuhjálparafelagnum
Heilsurøktarafelag Føroya
Føroya Pedagogfelag
Føroya Lærarafelag
Felagnum føroyskir sálarfrøðingar
Ljósmøðrafelag Føroya
Starvsmannafelagnum
Fysioterapeutfelag Føroya
Ergoterapeutfelag Føroya
Sosialráðgevarafelag Føroya
Felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar
Almannaverkinum
Føroya Kærustovni
Dugna
Sjóndeplinum
Kvinnuhúsinum
Fountainhúsinum
Heilbrigdi
Frælsi
Bláa Krossi
Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark
Arbeiðsloysisskipanini
Dátueftirlitinum
Kriminalforsorgini
Ríkisumboðnum
Føroya Landfúta
Landsfelag Pensjónistanna
Fosturforeldrafelagnum
Vinnuhúsinum
Samtaki
Fakfelagssamstarvinum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær tær stóru fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur. Viðmerkjast skal, at mett verður einans um fíggjarligar avleiðingar av hesum uppskotinum og ikki um avleiðingar av útleggingini av heimatænastuni, eldrarøkt v.m. í 2015 og tí fíggjarleisti, sum tá varð lagdur.

Broytingarnar í uppskotinum eru partvíst staðfesting av avgerðum, sum markamótsnevndin hevur tikið, og sum land og kommunur hava tillagað sítt virksemi til.

*Búpláss*
Tað nýggja í uppskotinum er, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita persónum undir fólkapensjónsaldri, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi,búpláss á ellis- og røktarheimum og eldrasambýlum. Talan er um borgarar, sum hava Alzheimers, demens og Sclerosu á øðrum stigi. Ilt er at meta um, hvussu nógvir borgarar hava ella fara at hava tørv á búplássum í framtíðini.

Hinvegin ásetir uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, at landið hevur ábyrgd av at veita borgarum undir fólkapensjónsaldri við seinheilaskaða og alkoholdemensi búpláss.

Uppskotið ásetir harumframt, at kommunurnar framhaldandi hava ábyrgd av at veita búpláss til fólkapensjónistar við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið

Borgarar, sum hava búpláss hjá landinum, uttan mun til um teir eru fólkapensjónistar ella hava Alzheimers, demens ella Sclerosu á øðrum stigi, verða ikki fluttir, orsakað av broytingunum í uppskotinum.

Í uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógini), so verður tað eisini ásett, at borgarar, sum hava búð í vardum bústaði hjá Almannaverkinum, áðrenn teir vórðu fólkapensjónistar, kunnu verða búgvandi í varda bústaðnum, um borgarin sjálvur ynskir tað, og um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið.

Ilt er at meta um, hvussu nógvir borgarar ynskja at flyta ella ikki kunnu fáa eina nøktandi tænastu á bústaðartilboðum frá landinum í framtíðini.

Upplýsast kann, at Almannaverkið í løtuni veitir 19 borgarum, sum eru 67 ár og eldri, búpláss. Til samanberingar kann nevnast, at í 2014 vóru tað 12 borgarar ella ein vøkstur á 7 persónar yvir 4 ár.

*Dagtilhald og umlætting*
Tað nýggja í uppskotinum er, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita dagtilhald og umlætting til persónar undir fólkapensjónsaldri, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi. Talan er um borgarar, sum hava Alzheimers, demens og sclerosu á øðrum stigi.

Landið hevur hinvegin ábyrgd av at veita borgarum við seinheilaskaða dagtilhald og umlætting.

Kommunurnar hava møguleika at veita borgarum, sum hava Alzheimers, aðrar demens sjúkur og sclerosu á øðrum stigi tænastu á verandi dagtilhaldum, sum eru kring landið. Tað er torført at meta um, hvussu nógvir borgarar fara at hava tørv á dagtilhaldi og umlætting og harvið, hvussu nógv broytingin fer at kosta.

Upplýsast kann, at raksturin av dagtilhaldinum, sum Almannaverkið hevur til yngri borgarar við demens, er áleið 2,4 mió. kr. um árið.

*Heimatænastan*
Kommunurnar veita longu heimatænastu til allar borgarar, og hevur broytingin í sjálvum sær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

Landið veitir framhaldandi stuðulstænastu til borgarar undir fólkapensjónsaldri, ið kunnu varðveita tænastuna, um tað framhaldandi tænir endamálinum við tænastuni, og um borgarin sjálvur ynskir tað, tá hann er vorðin fólkapensjónistur.

*Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing*
Í mun til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing til fólkapensjónistar, so er talan um tænastur, sum kommunurnar longu hava. Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki fíggjarligar avleiðingar, tí tað er upp til kommunurnar at gera av, um og hvussu endurvenjing og viðlíkhaldsvenjing verða raðfestar á fíggjarætlanunum.

Um Almannaverkið fer at veita viðlíkahaldsvenjing til persónar undir fólkapensjónsaldri, fer tað, sum frálíður, at hava jaligar avleiðingar og viðvirka til, at fólk gerast minni røktarkrevjandi í fólkapensjónsaldri.

*Ansingarsamsýning*
Kommunurnar fáa heimild til at veita samsýning til persón, sum átekur sær at ansa persóni við varandi sjúku, ið er progressiv og degenerandi, ið hevur tørv á støðugari røkt og hjáveru, heima.

Velja kommunurnar at brúka heimildina, so verða fíggjarligar avleiðingar av broytingini. Hinvegin kann skipanin við ansingarsamsýning eisini viðvirka til at trýstið á búpláss og heimatænastu verður minni.

Samanumtikið verður tí ikki mett, at lógarbroytingin hevur stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar ella landið.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið er liður í arbeiðinum hjá landsstýrismanninum at forða fyri, at borgarar, sum hava tørv á tænastum orsakað av ellisbreki, týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum ella varandi sjúku, detta millum skipanir hjá ávikavist landinum og kommunum.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógin hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting og sektir, og lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið ásetir ikki skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið ásetir ikki gjald til avís endamál.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Landsstýrismaðurin fær heimild til at gera nærri reglur um endurvenjing í kommununum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Fyri at beina burtur ivan um, hvørt kommunur, umframt at veita øllum borgarum heimahjálp, eisini skulu veita stuðulstænastu, verður hugtakið "stuðul" strikað í uppskotinum um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Endamálið við broytingini er at staðfesta, at virksemið hjá heimahjálpini fevnir um persónliga hjálp og røkt og ikki um stuðulstænastu. Síðani 2015 hava ivamál verið millum land og kommunur um, hvør hevur ábyrgd av at veita persónum, sum fáa stuðulstænasta og hava tørv á røkt, tænastu.

Í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð verður nú ásett, at virksemið hjá stuðulstænastuni ikki fevnir um persónliga røkt umframt tað, sum persónurin sjálvur megnar við ráðgeving frá stuðulspersóninum. Harvið er eisini staðfest, at tað er uppgávan hjá kommununi at veita heimabúgvandi borgarum persónliga røkt.

Er talan um heimabúgvandi persón undir fólkapensjónsaldri, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek, sum fær stuðulstænastu sambært § 35 frá Almannaverkinum, og sum sjálvur megnar persónligu røktina við ráðgeving frá stuðulspersóni, so er ikki neyðugt, at kommunan veitir heimatænastu.

Er hinvegin talan um heimabúgvandi persón, sum fær umfatandi stuðulstænastu, og sum ikki sjálvur megnar at fremja persónliga røkt, hóast viðkomandi hevur ein stuðul, so eigur kommunan at veita persóninum heimahjálp til persónligu røktina. Dømi um hetta er persónur, sum hevur seinheilaskaða, ella persónur, sum hevur fjølbrek og fær viðgerð við andingartóli. Almannaverkið veitir hesum persónum stuðulstænastu, meðan kommunurnar veita heimatænastu.

Persónar, sum búgva á vardum bústaði hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovni, fáa neyðuga hjálp til persónliga og sjúkrarøkt frá starvsfólkum, sum sett eru í Almannaverkinum ella í sjálvsognarstovninum.

**Til § 1, nr. 2**
Ásetingin ásetir, at kommunur, umframt at veita heimabúgvandi fólkapensjónistum tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hesir kunnu búgva í egnum heimi sum longst, frameftir eisini veita persónum, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi, somu tænastur.

Talan er um borgarar undir fólkapensjónsaldri, sum hava varandi sjúku, sum eldri fólk samlíkt fáa, og sum er progressiv og degenerenardi. Alzheimers og onnur sløg av demensi eru mest vanligar í so máta, ið elva til, at persónur gerst óafturvendiliga og alsamt meira røktarkrevjandi. Sclerosa á seinna stigi er annað dømi.

Endamálið við ásetingini er at staðfesta, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita hesum borgarum tænastur og at forða fyri, at land og kommunur veita somu borgarum somu tænastu. At fyribyrgja, at land og kommunur skulu seta í verk paralellar tænastur og at skapa fortreytir fyri, at hesir borgarir fáa eina dygdargóða fakliga tænastu frá starvsfólki, ið hevur serkunnleika

til hesar varandi sjúkur sum eldri persónar samlíkt fáa. Dømi um hetta er m.a. dagtilhald til persónar við demensi, har Almannaverkið hevur eitt tilboð til fólk undir fólkapensjónsaldri meðan kommunurnar kring landið hava tilboð til fólkapensjónistar. Frameftir verða tað kommunurnar, sum veita dagtilhald til persónar, sum hava Alzheimers, aðrar demens sjúkur og sclerosu á øðrum stigi.

**Til § 1, nr. 3**
Stk.1 ásetir, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, sum vegna mistan førleika hava tørv á endurvenjing.
Endamálið við ásetingini er at nágreina markamóti, sum verið hevur millum áseting í forsorgarlógini og lógini um heimatænastu og eldrarøkt, og at staðfesta, at endamálið við endurvenjingini er, at borgarin kann búgva í egnum heimi sum longst og klára seg uttan ella við minni hjálp frá kommunum.

Stk. 2 heimilar landsstýrismanninum at gera nærri reglur og treytir um endurvenjing, sum kommunur veita. Ásetingar í hesi lóg eru bert galdandi fyri ta endurvenjing, ið fer fram í kommunum, og hevur tí ikki ávirkan á ta endurvenjing, ið fer fram í Almannaverkinum ella sjúkrahúsverkinum.

Dentur hevur tó verið lagdur á at samstarva við Almannaverkið og Heilsu- og innlendismálaráðið fyri at tryggja, at borgarar ikki detta niðurímillum skipanirnar, og fyri at tryggja, at borgarin fær eina samskipaða og skynsama endurvenjing tvørtur um stovnar og sostatt gera tað greitt, hvørja endurvenjing ávikavist kommunur, Almannaverkið og Heilsuverkið veita borgarum.

Í 2017 vórðu tvinnar kunngerðir um endurvenjing settar í gildi. Ein um endurvenjing í almannaverkinum og ein um endurvenjing í sjúkrahúsverkinum, sum áseta nærri reglur um endurvenjingarætlan, og áleggja ávikavist Almannaverkinum og sjúkrahúsverkinum at samstarva við aðrar myndugleikar.
Tað eru serliga reglur um endurvenjingarætlan og markamót til endurvenjing, veitta av Almannaverkinum og sjúkrahúsverkinum, sum hava týdning.

**Til § 1, nr. 4**
Stk. 1 ásetir, at kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti, sum orsakað av ellisbreki ella sjúku hevur týðandi og skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni hjá persóni, viðlíkahaldsvenjing.

Stk. 2 ásetir, at endamálið við viðlíkahaldsvenjingini er at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at fólkapensjónisturin kann búgva heima sum longst og klára seg uttan ella við minni hjálp frá kommununi. Viðlíkahaldsvenjingin í kommununi hevur sostatt partvíst eitt annað endamál enn viðlíkahaldsvenjingin í Almannaverkinum, ið skal tryggja, at persónur kann fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Í stk. 3 verður ásett, hvussu langa játtan til viðlíkahaldsvenjing kommuna í mesta lagi kann lata í senn. Kommuna kann geva styttri játtanir, um viðurskiftini hjá persóninum tala fyri tí. Tað kann vera sjúka,sum ger, at tørvurin á viðlíkahaldsvenjing broytist skjótt. Kommuna kann tó

eisini leingja eina játtan uttan stórvegis málsviðgerð, um viðskiftini hjá persóninum tala fyri tí, eitt nú um talan er um støðuga sjúku, har tørvurin á viðlíkahaldsvenjing ongantíð broytist. Ella tí persónurin er kendur í kommununi, eitt nú tí hann gongur til viðlíkahaldsvenjing.

Endamálið við hesi áseting er at gera tað lættari fyri persónar, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing, soleiðis, at hesi sleppa undan at brúka óneyðuga tíð og orku til at skriva umsóknir og bíða eftir svari til hesar. Støðan hjá borgarum, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing, er varandi, og tørvurin á viðlíkahaldsvenjing verður, tá til stykkis kemur, eisini varandi. Hinvegin so kann støðan eisini broytast munandi, og tá er gott, at støðan hjá borgaranum verður tikin upp m.a. fyri at fáa staðfest, um tað framhaldandi gevur meining at veita viðlíkahaldsvenjing. Kommuna hevur skyldu til at taka nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing, áðrenn játtanarskeiðið endar, soleiðis at forðað verður fyri, at borgari stendur uttan tilboð, orsakað av langari svartíð.

**Til § 1, nr. 5**

Sambært stk.1 fáa kommunur nú heimild til at taka avgerð um at veita fólki samsýning, sum átaka sær at ansa persóni heima, sum hevur varandi sjúku, sum er progressiv og degenerandi. Talan er um konsekvensbroyting í sambandi við, at kommunurnar veita búpláss til borgarar, sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenererandi.

Endamálið við skipanini við ansingarsamsýning er m.a. at gera tað møguligt hjá borgarum at vera sum longst í egnum heimi, og kann skipanin eisini lætta um trýstið á ellis- og røktarheim og eldrasambýli.

Broytingin verður gjørd fyri at tryggja, at samanhangur er millum skipanina við ansingarsamsýning og búpláss á ávikavist ellis- og røktarheimi og eldrasambýli.

**Til § 1, nr. 6**

Ásett verður, at kommunurnar, umframt at veita fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, sum hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið, eisini veita borgarum, sum eru undir fólkapensjónsaldri og sum hava varandi sjúku, sum er progressiv og degenerativ, búpláss á ellis- og røktarheimum ella eldrasambýlum. Málbólkurin er m.a. fólk við Alzheimers, demens og sclerosu á 2. stigi.

Borgarar, sum bera fjølbrek, og borgarar, sum hava seinheilaskaða, sum eisini kunnu metast at vera røktarkevjandi, fáa vardan bústað frá landinum sambært løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin).

Borgarar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar og eru undir fólkapensjónsaldri, fáa búpláss sambært § 45 ella § 46 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.

§ 5 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð heimilar, at borgari kann verða búgvandi í varda bústaðnum, tá viðkomandi gerst fólkapensjónistur, um borgarin sjálvur ynskir tað, og um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið.
Orsøkin er meginreglan um sjálvsavgerðarrætt, og at fólk, sum bera brek, so vítt gjørligt skulu hava møguleika fyri at velja, hvar tey vilja búgva, og at forða fyri, at borgarar detta niðurímillum tvær skipanir, orsakað av aldri.

Hinvegin so gerast borgarar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar og fáa vardan bústað frá Almannaverkinum, alsamt eldri, og harvið eisini alsamt meira røktarkrevjandi. Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum eru tað í løtuni 19 persónar, sum eru 67 ár og eldri, sum fáa búpláss frá Almannaverkinum. Tá vardi bústaðurin ikki longur kann veita borgaranum eina nøktandi tænastu, so kann borgarin fáa pláss á einum ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli eins og aðrir borgarar, sum eru fólkapensjónistar og hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið. Í slíkum føri verður tað kommunan, sum yvirtekur ábyrgdina av borgaranum. Í slíkum førum verður tað talan um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum máli.

Tað eru eisini nógvir persónar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum búgva leingi í egnari íbúð við tænastum frá Almannaverkinum og heimatænastu frá kommununi. Hesi gerast eisini alsamt eldri.

Frameftir skulu persónar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum eru fólkapensjónistar og hava verið heimabúgvandi alt lívið, fáa pláss á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli í nærmumhvørvinum eins og onnur, tá tey gerast røktarkrevjandi. Borgari, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hevur víðfevndar sosialar trupulleikar, og er fólkapensjónistur, kann ikki fáa tillutað vardan bústað sambært løgtingslóg um almannatrygd og vælferð

Kommunur kunnu við øðrum orðum ikki nokta einum fólkapensjónisti, sum ber brek, búpláss á einum røktarheimi, um viðkomandi annars lýkur upp til treytirnar fyri at fáa eitt røktarheimspláss.

Hetta er í samsvari við meginreglurnar um inklusión og sektorábyrgd, sum í høvuðsheitum merkja, at borgarar, sum bera brek, ikki skulu noyðast í sertilboð, og at hvør myndugleiki, sum hevur ábyrgd av at veita eina almenna tænastu, eisini hevur ábyrgd av at tryggja, at sama tænasta verður veitt borgarum, sum bera brek.

Sambært stk. 2 er heimild fyri, at ellis- og røktarheim og eldrasambýli mótvegis gjaldi frá landinum kunnu hýsa persóni, sum hevur tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið, orsakað av týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum. Talan er um persónar, sum fáa vardan bústað frá landinum sambært § 45 ella § 46 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð.

Endamálið við hesi áseting er at geva Almannaverkinum møguleika fyri at veita borgarum, sum t.d. hava seinheilaskaða, eitt bústaðartilboð í nærumhvørvinum tætt familjuni og tí umhvørvi, sum hann var partur av, áðrenn hann fekk heilaskaðan.

Almannaverkið hevur stórar avbjóðingar við at veita bústað til eitt nú fólk við seinheilaskaða,og hóast ætlanir eru um at byggja fleiri bústaðir til henda málbólk, so verður neyvan talan um at byggja bústaðir kring landið. Borgarar, sum hava seinheilskaða og hava tørv á einum vardum bústaði frá Almannaverkinum, eru úr øllum landinum. Tað er ein avbjóðing hjá Almannaverkinum at veita teimum bústað í nærumhvørvinum, og verða tey tískil noydd at flyta.
Møguleiki er nú sambært hesum uppskoti fyri, at Almannaverkið kann keypa búpláss á einum røktarheimi ella einum eldrasambýli og harvið geva borgaranum møguleika fyri at búgva so tætt familju og tí umhvørvi, sum hann var partur av, áðrenn hann fekk heilaskaða.

Skal ásetingin virka í praksis, er alneyðugt,

at land og kommunur semjast um ein kostnað fyri búpláss, hvør frá øðrum.

Heimild er eisini í § 68 í uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð fyri, at Almannaverkið mótvegis gjaldi kann veita ávísar tænastur til kommunur herundir eisini bústað.

Til § 2

Gildiskoma

Almannamálaráðið, 26. juni 2018.

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: